gult cyan magenta svart



**FERÐING. »Pasporta Servo«, hevur 25 ár á baki. Hetta er eitt millumtjóða gistingarnet við esperantistum, sum hýsa ferðandi esperantistum, har tú kanst gista fyri einki, bert tú talar esperanto og hevur eitt eintak av bókini »Pasporta Servo« við tær.**

# Millumtjóðasamskifti

ESPERANTO

*Jeffrei Henriksen*

Esperanto verður nýtt í millumtjóða brævaskifti (eisini um teldupost), í bløðum og tíðarritum, og harafturat á ymiskum esperantostevnum eins og á (fjakkara)ferð burtur í onnur lond.

Í grein í kinverskum esperantotíðarriti El Popola Chinio greiðir ein blaðmaður, Zhu Mingyi, frá, hvussu hann nýtti mong ár til at læra fremmand mál. Í 6 ár las hann enskt, men bæði framburður og orð vóru so torfør at læra, at hann var ikki førur fyri at nýta tað málið. Síðan las hann russiskt; men mállæran royndist sera fløkt, og hann heldur seg ikki duga russiskt nóg væl. So fór hann undir at læra esperanto, sum hevur regluliga mállæru, orðasamanseting og altjóða orðatilfar. Eftir bert hálvt ár royndi hann at týða greinarstubbar til El Popola Chinio, og eftir minni enn eitt ár var hann rættiliga førur fyri at týða úr kinverskum til esperanto. Í starvi sínum sum blaðmaður hevur hann skift brøv við esperantistar í Brasil, Bretlandi, Eysturríki, Finnlandi, Fraklandi, Hálandi, Japan, Meksiko, Portugal, Spania, Svøríki, Sveis, Týsklandi og USA.

Nógv ung fólk læra seg esperanto við eittans endamáli: at njóta fyrimunirnar við »Pasporta Servo«, sum nú hevur 25 ár á baki; tað er eitt millumtjóða gistingarnet við esperantistum, sum hýsa ferðandi esperantistum og tú kanst gista hjá teimum fyri einki og njóta staðkendan blíðskap, um bert tú talar esperanto og hevur eitt eintak av bókini »Pasporta Servo« við tær. Hetta er ein bók við reglunum fyri skipanina og við atsetrum hjá í løtuni 1075 vertum í 76 londum um allan heim - og har legst skjótt afturat! Bókin kostar 10,90 evrur, t.e. góðar 80 kr. og við avsláttri, um fleiri verða keyptar saman. Og teknar tú teg sjálvan sum vert, fært tú bókina sendandi árliga fyri einki, og við henni fullan rætt at nýta gistingarnetið, somuleiðis fyri einki. Annars eru gistingartreytirnar ymiskar: onkur krevur, at tú hevur soviposa við, og býður kanska ikki morgunmat, onkur tekur bert 1 gest eina nátt, ein 10 gestir ein mánað (men rímiliga uttan kost) o.s.fr. Summir vertir vilja hava skrivlig boð frammanundan; onkur sigur: »Kom við egnari hættu; eg eri ofta burturstaddur.«

Ein genta úr Kalifornia hevur ferðast í meir enn eitt hálvt ár í Evropa, vanliga uttan at avtala meir enn við ein ella tveir vertir fram, men alla tíðina á pasporta-netinum.

Bókin »Pasporta servo« fæst m.a. hjá norska esperantofelagsskapinum, esperanto@online.no

Danska esperanto-ungdómsfelagið UFFE greiðir fegin meir frá um Pasporta Servo, um brævaskifti á esperanto, ungdómsstevnur í ymiskum londum o.m.a. - Árliga heims-ungdómsstevnan verður í ár í Strasbourg. Eisini kann nevnast norðurlendski »Kultura esperanto festivalo« við sjónleiki, rock, yrking og sangi.

UFFE, c/o Christian Clausen, Nyvej 16, Gl. Ry, DK-8680 Rye <crcYY@pip.dknet.dk>
Heimasíðan hjá Pasporta servo
á íslendskum:
http://home.wxs.nl/~lide/ps_lingv/ps_is.htm -
á norskum:
http://home.wxs.nl/~lide/ps_lingv/ps_no.htm

Eitt yvirlit yvir tær atsetursupplýsingar, ið eru komnar afturat, síðan Pasporta servo 2001 fór til prentingar í desember, er á http://home.wxs.nl/~lide/ps/ps_mapoj.htm - Trýst við músini á tað landið ella heimspartin, tú vilt hava yvirlit yvir (g=gestir, t=nætur).

Á internetinum kemst eisini inn á ymiskar aðrar áhugabólkar; har eru m.a. bólkar, ið viðgera evni sum handilsskap, tíðarrit, internet, mentan, søgu, uppaling, kvinnurørslu, ungdómslív, tónleik. - Far inn á http://www.esperanto.se/-virtuala/ og trýst t.d. á KUNE og síðan á Hazarda ttt-ejo (svarar teldan »sorry«, so bakka og royn aftur Hazarda ttt-ejo).



*– Nógv ung fólk læra seg esperanto við eittans endamáli: at njóta fyrimunirnar við »Pasporta Servo«,*

*(Mynd: Jens Kristian Vang)*

**ANTHOLOGY. Ongantíð fyrr er bók útgivin, har beatlarnir sjálvir siga gott fyri hvørjum orði. Nú er bókin The Beatles Anthology komin út kring allan heim. Les her um, hvat teir fýra siga um útgávur so sum The Beatles for Sale, A Hard Days Night, Help og Rubber Soul. Les eisini um, hvussu John Lennon og Paul McCartney eru ósamdir um lagið »In My Life«**

# The Beatles um The Beatles

TÓNLEIKUR

*Niclas Johannesen*

*4. partur*

## Um beatlemania

JOHN: Vit vóru stuttligir á tíðindafundum, tí alt var ein joke. Tey spurdu ein býttan spurning, og so góvu vit eitt býtt svar, men vit vóru slettis ikki beinleiðis stuttligir, tað var meira talan um, at tú flenti at tí sama, sum tú flennir at í skúlanum. Fjølmiðlarnir vóru andstyggilir. Um tað vóru nakrir skilagóðir spurningar, so royndu vit at svara í álvara. Vit vóru fjáltursstungnir, hóast eg rokni ikki við, at fólk hildu tað.

Okkara image var bara ein evarska lítil partur av okkum. Tað var skapt av fjølmiðlunum og okkum sjálvum.

GEORGE: Allastaðni vit fóru, brynjaði løgreglan seg og vísti seg sjálvan fram. Øll blivu rakt av galskapi. Tú kundi gjørt ein film, sum bara snúði seg um, hvussu idiotisk øll onnur vóru, so skjótt The Beatles komu til býin. Í Amerika plagdi løgreglan at halda skil á ferðsluni. Teir plagdu at koyra fremstir á teirra motorsúkklum. Teir komu til ein krossveg, lyftu báðar hendur í loft og blástu í teirra floytur. Síðani plagdi ein onnur súkkla at koyra fram til næsta krossvegin, men teir royndu allir at vera flúgvandi, koyra inn og út og drøna eftir vegnum. Teir elskaðu kensluna av: »Her kemur forsetin!« Men teir krasjaðu allir og duttu av. Tað hendi allastaðni – sjálvt í Svøríki!

JOHN: Alt vaks og vaks. Jú størri vit gjørdust, tess meira veruleikafjart gjørdist alt, og tess meira varð roknað við okkum – inntil tú ikki tekur í hondina á borgmeistarafrúuni og hon byrjar at rópa og skríggja, »hvat billar tú tær inn!«

*Beatlarnir á amerikanskum sjónvarpsskermi*



RINGO: Eg helt turnegalskapin vera spennandi. Eg elskaði tað.

PAUL: Fólk søgdu »gerast tit ikki svakir av øllum gentuskríggjunum?« Men vit løgdu einki í tað, tí onkuntíð so fjaldi tað útyvir ein ørgrynnu av syndum: vit stemmaðu ikki. Tað kundi gera tað sama – vit hoyrdu tað ikki, og tað gjørdu tey heldur ikki.

GEORGE: Tað einasta staðið vit fingu frið var, tá vit komu á hotelkamarið og læstu okkum sjálvar inni á wc'inum. WC'ið var at kalla tað einasta staðið, tú kundi fáa frið.

## Um Bob Dylan

JOHN: Tá eg møtti Dylan, var eg eitt sindur málleysur. Sjálvur eri eg nokk so nógv av eini fan-typu. Eg helt upp at við at vera ein »fan«, tá eg sjálvur gjørdist kendur. Eg var aldrin tann sum savnaði autografar og alt hatta har. Men dámar mær onkran, so dámar mær tey sera væl. »You've Got To Hide Your Love Away« er mítt Dylan tíðarskeið. Tað var ein av



*John í hornatøkum við miðlarnar*

hesum, har tú syngur eitt sindur sorgblítt um teg sjálvan »Here I Stand, Head in hand…«. Eg byrjaði at hugsa um mínar egnu kenslur. Eg veit ikki fyri vist, nær tað veruliga byrjaði, so sum »I'm A Loser« ella »Hide Your Love Away«. Í staðin fyri at fantasera meg sjálvan í onkra ávísa støðu, so byrjaði eg at úttrykkja tað, eg sjálvur føldi, líka sum eg hevði gjørt í mínum bókum. Eg haldi, Dylan hjálpti mær at síggja hetta – ikki við at práta saman um tað, men gjøgnum hansara list.

Eg hevði eitt slag av professionellum sangskrivarahugburði við at skriva poppsangir, vit royndu at skriva ein ávísan stíl til eina single og ein annan stíl til onkra aðra. Har fanst ein annar sangskrivandi John Lennon, sum skrivaði sangir til kjøtmarknaðin, og eg helt teir ikki (orðini ella nakað annað) hava nakra dýbd yvirhøvur. Tá eg so vildi úttrykkja meg sjálvan, so gjørdi eg tað heldur gjøgnum A Spaniard in the Works ella In His Own Write, tær persónligu søgurnar sum góvu far um mínar persónligu kenslur. Síðani byrjaði eg at blíva eg í sangunum, eg skrivaði ikki longur objektivt, men subjektivt.

## Um Beatles útgávur

RINGO: Nakað av tilfarinum á Beatles For Sale og á Rubber Soul í 1965 var bara knallgott, onki sum hendi aðrastaðni var líka sum tað. At vera í studionum nú gjørdist heilt spennandi. Vit gjørdu alt inni har: venjing, upptøkur og fínpussing. Vit leigaðu ongantíð venjingarhøli fyri at gjøgnumganga sangirnar, tú nógvir teirra vóru ikki lidnir. Hugskotini vóru har til fyrsta vers, ella eitt niðurlag, men tað kundi verða broytt av sangskrivarunum meðan vit spældu, ella um onkur hevði eitt gott hugskot.





*Beatlarnir í amerikaskum miðlum*

Í fyrstu atløgu hoyrdi eg altíð ein nýskrivaðan sang á antin klaveri ella guitara. Tað er deiligt at hoyra akkordskiftini á ymsu løgunum soleiðis. Ofta broyttust tey nógv. Fyrst plagdi tann, sum hevði skrivað lagið at siga, »tað gongur soleiðis«. Teir plagdu at spæla tað á guitar ella klaver, og sungu við hvørja ferð – teir plagdu at læra at syngja lagið meðan vit allir lærdu at spæla sangin, umaftur og aftur.

Flestu av teimum snimmu upptøkunum vóru tiknar á trý spor og so høvdu vit eitt spor til at taka oman á við. Hetta var eisini við til at halda orkestrinum saman – vit spældu og spældu og spældu. Um ein av teimum kundi syngja lagið, so kundu vit fýra spæla inntil neytini komu heim. Hetta við at »eg leggi bassin á seinni, ella guitarin« tað fanst ikki. Vit gjørdu tað har og tá, íroknað sangin.

PAUL: Tað tók ikki leingi at taka Beatles For Sale upp. Í veruleikanum var tað okkara pallframførsla umframt nøkur nýggj eykaløg – sum til dømis »Eight Days A Week«. Eg minnist meg skriva hann saman við John heima hjá honum í Weybridge. Orðini stavaðu frá einum bussførara, sum koyrdi meg út hagar. Eg spurdi hann »hvussu hevur tú tað« og hann segði, »á, eg eri troyttur. Eg havi arbeitt átta dagar um vikuna«. Vit skrivaðu altíð løgini í rættiligari snarari vending.

Vit kundu ikki taka løgini upp á band tá á døgum, tí tað vóru ongi kassettubond tá. Vit máttu minnast, sum altíð var ein góður háttur, tí um sangurin onki nyttaði, ja so gloymdu vit hann.

JOHN: Tey flestu fólkini halda, at »Help!« er ein skjótur rock'n'roll sangur. Eg hugsaði ikki um tað tá – Eg skrivaði bara sangin, tí eg fekk til uppgávu at skriva lagið til filmin (av sama navni) – men seinni fataði eg, at eg í veruleikanum rópti eftir hjálp. »Help!« snúði seg um meg, hóast tað var eitt sindur poetiskt. Eg trúgvi alt kemur út í sangum. Alt hetta við The Beatles stakk djúpri enn tað, vit kundu fata. Eg át og drakk sum eitt svín, og eg var feitur sum eitt svín, ónøgdur við meg sjálvan og úr loynivitskuni rópti eg um hjálp. Hetta var mítt feita Elvis tíðarskeið.

PAUL: Tað var soleiðis við »A Hard Day's Night«, at John fór heim og kom aftur og hevði skrivað meginpartin av sanginum, men við »Help« settu vit okkum og skrivaðu lagið saman. Eg minnist, hvussu vit sótu saman, og John fekk hugskotið til tittullagið. Eg hjálpti honum við strukturinum og kom við kontramelodilinjum.

## Um persónseginleikar

JOHN: Eg vil ikki verða oyramerktur sum ein kynikari. Eg eri eitt sindur kyniskur, men eg eri ikki ein kynikkari. Tú kanst vera avskeplaður ein dag, kyniskur ein annan dag, og ironiskur dagin eftir. Tá tað snýr seg um ymiskt, sum fólk taka sum eina sjálvfylgju, so eri eg kyniskur: Samfelag, politikkur, tíðindabløð, stjórnin. Men eg eri ikki kyniskur, tá tað snýr seg um lívið, kærleika og næstrakærleika, deyða.

Paul kann vera sera kyniskur og nógv meira bítandi enn eg, tá hann verður drivin til tað. Hann er meira tolin enn eg, sjálvsagt, hann kann høgga í fólk upp á null komma nix, tá hann er kroystur. Paul rakar hamaran beint á høvdið og stingur ikki halan millum beinini.

PAUL: Eitt av mínum bestu minnum um John stavar frá, tá vit plagdu at trætast um okkurt. Eg var ósamdur við hann og vit róptu illkvæmis orð eftir hvørjum øðrum. Vit sissaðust eftir eini løtu og síðani setti hann brillugløsini longur niður á nøsina og segði »Tað er bara eg…« og so setti hann brillurnar upp aftur á nøsina.

JOHN: Eg sat á eini matstovu í Spania og ein fiólspælari bleiv við at vilja spæla »Yesterday« í mítt høgra oyra. Síðani bað hann meg skriva á hansara fiól. Eg visti ikki, hvat eg skuldi siga, so eg segði »í lagi«, og skrivaði. Tað sama gjørdi Yoko. Ein dag fer hann at finna útav, at Paul skrivaði lagið. Men eg giti, at ikki bar til hjá honum at ganga millum borðini og spæla »I Am The Walrus«.

GEORGE: Høvuðstrupulleikin við populariteti er, at fólk gloyma at uppføra seg sum vanligt. Tey hava ikki virðing fyri tær, men fyri tí tey halda, tú ert blivin. Tað einasta tær nýtist at gera, er at fara í útvarp ella sjónvarp einaferð, og tá tú síðani hittir fólk á gøtuni, so uppføra tey seg øðrvísi. Og The Beatles høvdu verið á forsíðunum á bløðunum hvønn dag í umleið tvey ár. Øll broytast, tey eru so imponeraði.

## Um hash

GEORGE: John plagdi at heinta okkum í sínum Rolls Royce, ið hevði døkkar rútar (Ringo, John og eg vóru allir fluttur út um London at búgva). Vindeyguni plagdu at vera aftur og vit roykt u nakrar feitar. Tá vit endiliga komu til Hammersmith vóru vit fult lessaðir og føldu okkum sjúkar. Vit plagdu at stegða uttan fyri Abbey Road og detta út úr bilinum. Tá tað snýr seg um Beatles -søguna, so er torført ikki at nevna hash.

RINGO: Hash var veruliga við til at broyta okkum. Serliga sangskrivararnar. Og av tí, at teir skrivaðu øðrvísi, so byrjaðu vit eisini at spæla øðrvísi. Í øllum lívsins lutum vuksu vit. Nú, tá vit komu til Rubber Soul, so víðkaðist sangskrivingin og spælingin. »Nowhere Man« var góður. »Girl« var veruliga góður – løgin andadráttsljóð á lagnum. »The Word« var eitt annað gott lag. Vit funnu veruliga fram til onnur, øðrvísi ljóð og eg haldi, at tekstirnir broyttust eisini við sangum so sum »Drive My Car«, »Norwegian Wood«, »You Won't See Me«, »Nowhere Man« og »Michelle«, sjálvsagt.

GEORGE: Rubber Soul er mín farvoritt pláta, eisini um tað mundið, hon var gjørd. Eg haldi, tað var tann besta, vit gjørdu, og vit vistu fyri vist, at vit vóru í ferð vit at gera eina góða plátu. Vit brúktu meira tíð í studionum enn vit plagdu og vit royndu ymiskt nýtt. Men tað mest týdningarmikla var, at vit nú brádliga hoyrdu ljóð, sum vit ikki høvdu hoyrt áður. Vit lótu okkum eisini ávirkað av tónleikinum hjá øðrum, og alt stóð í blóma um hetta mundið, íroknað okkum sjálvar, tí vit stóðu framvegis í vøkstri.

JOHN: Rubber Soul var pott-plátan, meðan Revolver var sýruplátan.

GEORGE: Eg spældi basslinjuna til »Drive My Car«.

JOHN: Eg haldi, at »In My Life« var mítt fyrsta veruliga høvuðsverk. Tað var tann fyrsti sangurin, eg skrivaði, heilt tilvitað, um mítt lív. Eg skrivaði orðini fyrst og síðani sang eg tað. Tað var oftani so við tilfari so sum »In My Life« og »Across The Universe« og nøkur av teimum løgunum sum stinga seg eitt sindur út úr mongdini.

PAUL: Hetta er ein av teimum fáu sangunum, sum John og eg eru ósamdir um. Eg minnist meg skriva melodiin á eina mellotron, sum stóð heima hjá John.

GEORGE: Eg vil ikki siga, at mínir sangir eru autobiografiskir. Kanska »Taxman« er.

*Paul og Ed Sullivan fyrireika seg til samrøðu – og kanska ein sang fyri amerikansku tjóðini*



gult cyan magenta svart